

## Nýggj havn á Oyrareingjum

Leygardagin 7. mars klokkan 13 verður nýggja havnin á Oyrareingjum alment tikin í brúk. Heimasíðan hjá Tórshavnar Kommunu sigur, at hátíðarhaldið í sambandi við, at nýggja havnin á Oyrareingjum alment verður tikin í brúk, byrjar klokkan 13, tá Havnar Hornorkestur spælir. Síðani er skráin hendan: klokkan 13.15 flytir Jákup Símun Simonsen, formaður í havnanevndini, fram røðu. Síðan spælir Havnar Hornorkestur. Klokkan 13.30 fara Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Jákup Símun Simonsen, formaður í havnanevndini, at klippa snórin og beint eftir verður alment kaffiborð umborð á Smyrli, sum liggur við bryggjuna

# Sjúkrarøktarfrøðingar rykkja eftir stjóra

**Sjúkrarøktarstjórin, Lisbeth Lykke Bruun, fer úr starvi 1. mars, men Landssjúkrahúsið hevur ikki lýst eftir nýggjum leiðara. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar rykkja nú eftir svari, um nær nýggjur sjúkrarøktarstjóri verður settur**

SJÚKRARØKT

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

- Vit hava sent Landssjúkrahúsinum skriv um nær nýggjur sjúkrarøktarstjóri verður settur í starv, men hava einki frætt. Tí fara vit nú at senda eitt nýtt skriv, har vit rykkja eftir svari, sigur Vár í Gong, forkvinna í Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Tað var í farna mánaði, at virkandi sjúkrarøktarstjórin, Lisbeth Lykke Bruun, segði seg úr starvi. Men eingin lýsing hevur verið at sæð, um at Landssjúkrahúsið søkir eftir nýggjum stjóra. Tað skilst, at fleiri hol eru í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, sum manglar fleiri leiðarar. Fyri Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er tað av alstórum týdningi, at hava ein leiðara, og tískil rykkir felagið eftir svari.

- Tað hastar, at fáa nýggjan stjóra fyri økið, og tað er alneyðugt fyri okkara felag. Vit undrast á, at starvið ikki er lýst leyst enn. Starvslýsingarnar skuldu langt síðan verið komnar, sigur Vár í Gong.

Tað var miðskeiðis í 1990 árunum, at Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fóru í verkfall, tí teimum manglaði ein stjóra. Seinasti sjúkrarøktarstjórin, Lisbeth Lykke Bruun, segði seg úr starvi í farna mánaði. Hon virkaði sum stjóri í einans sjey mánaðir. Orsøkin til uppsøgnina, var persónlig, segði hon. Við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur hon sagt, at hon var væl nøgd við arbeiðsøkið, og at nógv var at taka hond í. Seinastu tíðina hevur Lisbeth Lykke Bruun ikki verið til staðar.



*– Vit undrast á, at starvið ikki er lýst leyst enn. Starvslýsingar skuldu langt síðan verið komnar, sigur Vár í Gong, forkvinna í Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar*

*Savnsmynd*

Allan Skaalum var upptikin av fundi, og var tí ikki at hitta í dag.

Hans Pauli Strøm sá seg ikki føran fyri at svara spurninginum um setan av nýggjum sjúkrarøktarstjóra í dag.




# Gleðistár í Pætursgøtu

**Gleðin var stór í Pætursgøtu í gjárkvøldið, tá tíðindini bórust um at búfólkini í Pætursgøtu kundu vera verandi í sambýlinum**

PÆTURSGØTA

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Búfólkini í sambýlinum í Pætursgøtu eru ovurfegin um avgerðina hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum um at strika sparingina av stovninum.

– Hetta vóru gleðiboð. Eg varð so positivt tikin á bóli av boðunum. Eg havi verið stúrin, og havi hugsað nógv um tað hesar seinastu dagarnar, sigur Niels Heðin Gaard Joensen.

Lagið hevur ikki verið nakað serligt á búfólkunum í Pætursgøtu seinastu dagarnar.

- Eg má siga, at tað hevur verið grátur. Men í gjárkvøldið varð tað altso gleðistár, vit feldu, sigur hann glaður.



*– Eg má siga, at tað hevur verið grátur. Men í gjárkvøldið varð tað altso gleðistár, vit feldu, sigur Niels Heðin Gaard Joensen, nú tað er kunngjørt, at sambýlið í Pætursgøtu fær frið fyri sparingum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Saman við búfólkunum, eru starvsfólk og tey avvarandi ovurfegin um at Niels Heðin og hinir sleppa at vera verandi í sambýlinum. Sambýlið í Pætursgøtu hevur nógv at siga fyri búfólkini, ikki minst fyri Niels Heðin Gaard Joensen.

- Eg eri glaður fyri at vera her. Eg eri glaður fyri at hava starvsfólkini her at venda mær til, tá eg havi brúk fyri tí. Tað kennist trygt her.

Niels Heðin Gaard Joensen heldur tað hava gjørt ávirkan, at hann hevur verið fram í miðlunum, og greitt frá støðuni, og hann er ikki sørt errin av úrslitinum. Nú kann hann kenna seg tryggan í Pætursgøtu.

- Her verið eg búgvandi til lutaíbúðirnar verða veruleiki, staðfestir hann.

Rósa Samuelsen kunngjørdi í tíðindasendingini á nátturða í gjárkvøldið, at sambýlið í Pætursgøtu er bjargað. Ætlanin var at fáa eina viðmerking til blaðið í dag, um hvussu peningurin er fingin til vega og hvussu tað verður sparingum á øðrum stovnum, men tað eydnaðist tíverri ikki.

Hon segði við útvarpið hjá Kringvarpinum, at hon væntaði at fáa eina eykajáttan til almannaøkið.